# Føroyskur stílur

## Skrivlig roynd í 9. flokki

**Eysturskúlin**



# Ungdómsval 2014



Nú ber til hjá ungdómi í Tórshavnar kommunu at velja umboð í ungdómsráðið. Øll, sum eru fylt 14 valdagin hava lov at velja.

Val til Tórshavnar Ungdómrsráð verður dagarnar 24.-28. mars 2014. Tað hevur mentamálanevndin avgjørt, og sjálvt valið fer fram um app og internet.

Allir ungdómar í Tórshavnar kommunu millum 14 og 22 ár valdagin fáa høvið at velja limir í ungdóms- ráðið. Valskeiðið er 2 ár.

Umframt at velja, so hava tey eisini møguleika at stilla upp, og soleiðis verða beinleiðis partur av ráðs-

arbeiðnum. Í alt 5 limir umframt 5 varalimir skulu veljast í ungdómsráðið.

**Valevni skulu stilla upp**

Valevni, sum ynskja at stilla upp, skulu hava minst 5 stillarar, ið eisini skulu lúka treytirnar fyri valrætti til ungdómsráðið. Hetta verður gjørt á serstøkum oyðiblað – Freistin at stilla upp og lata inn oyðiblaðið er 7. mars 2014 kl. 12 á Snarskivuni.



**Ungdómsráðið er umboð teirra ungu**

Býráðið samtykti síðsta heyst at skipa Tórshavnar Ungdómsráð, har tað er staðfest, at ungdómsráðið er umboð teirra ungu í kommununi. Eitt endamál er at styrkja fólkaræðið í kommununi við at skapa eitt

forum, har ung fáa eina rødd í býráðs-politisku skipanini og arbeiðinum. Ítøkiliga skal ungdómsráðið takast við í viðgerð av málum, sum kommunan arbeiðir við og sum viðvíkja ungdóminum, eitt nú viðvíkjandi frítíðarvirksemi, lestrarumhvørvi og kollegium. Eisini kann ungdómsráðið seta fram uppskot og hugskot til nevndir og býráð um viðurskifti, sum kunnu betra um korini og trivnaðin hjá teimum ungu.

Ungdómsráðið hevur sostatt eina týdningarmikla uppgávu og leiklut í politisku avgerðartilgongdini, og tí er umráðandi, at nógv vilja stilla upp.

*Kelda: Tikið av heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu*

## Uppgávuorðing:

1. Greið frá um fólkaræði.
2. Hví hevur tað týdning, at ung sleppa at virka í fólkaræðinum?
3. Hvat kundi tú hugsað tær varð gjørt, varð tú valdur inn í ungdómsráðið?

**Ger tína egnu yvirskrift!**



# 2. stílevni



Adam verður skaptur: málningur eftir Michelangelo frá 1511-1512. Hann er partur av loftinum í Sixtinska Kapellinum í Róm.

## Flugan

Onkuntíð eygleiddi tú eina flugu ið sat føst ímillum

rútarnar í termoeyganum

Onkuntíð keddu teir teg við allari skuldini og

sundursoringini

Onkuntíð stjól tú tær tíðina aftur

Kanska var Gud

Ein smágenta

Í heimabundnum kjóla

Og Guð skapaði mannin eftir síni mynd, í Guðs mynd skapaði hann hann, sum kall og konu skapaði hann tey, og Guð vælsignaði tey

*1. Mósebók. 1,27,28*

Og lakkskóm

Kanska var Gud
Bæði Innari
Og uttari rúturin
Í Termoeyganum

Kanska

Var Gud
Eisini
Flugan

Fangað
Í síni egnu
Tríeind


Hví man Adam ikki røkka at nema við fingurin á Gudi?

*Marjun Syderbø Kjelnæs*

Yrkingin stendur í savninum *Rót Tripp – Orð en route* (Sprotin 2012).

**Uppgávuorðing:**

1. Greina og tulka yrkingina.

2. Samanber myndirnar og brotið úr 1. Mósebók við yrkingina.

**Ger tína egnu yvirskift!**



Hann hevur skund. Myndin er frá Politinum.

## Soleiðis sær ein tjóvur út!



**Snorri Brend**

**INNBROT:** Mong fingu helst ein minni skelk, tá løgreglan í gjár valdi at almannakunngera fleiri videobrot frá einum innbroti, sum varð framt undan jólum í fjør.

Tað serstaka í hesum er, at løgreglan við brotinum ynskti hjálp at uppklára hetta innbrotið, sum var framt móti einum handli í Havn.

Hóast hesar upptøkurnar av tjóvunum vóru í miðlunum í gjár, hevur ongin gjørt vart við seg enn hjá løgregluni.

- Nei, enn hava vit onga fráboðan fingið, sigur Jón Klein Olsen við Portalin. Hinvegin er lætt at síggja teir tríggjar innbrotsmenninar, hóast myndirnar eru svart/hvítar. Serliga gongulagið og rennilag teirra kunnu hjálpa løgregluni í uppkláringini.

Tí vónar løgreglan framvegis, at onkur fer at koma við upplýsingum, ið ger at hetta innbrotið kann verða uppklárað – og at ein eisini kann sleppa undan fleiri slíkum í framtíðini.

**SKRÁPLAN** Upptøkurnar av innbrotinum, ið varð framt í tíðarskeiðnum 21. til 22. desember í fjør, vórðu lagdar á heimasíðuna hjá løgregluni – og eisini sendar beinleiðis til tíðindatænastuna. Hyggur ein eftir upptøkunum sæst rættiliga týðiliga, at tríggir ungir mans fremja hetta innbrotið á miðjari nátt, tá tað er nakað av vindi eisini.

Teir hava latið seg í til høvið – allir hava hettu, men einki kann tó sigast um litin á klædnapløggunum, tí vakmyndatólið vísir bert myndirnar í svørtum/hvítum.

Tað sæst, at teir hava skund, bæði á veg inn í handilin, - ikki minst, tá teir fara avstað aftur við fonginum. At løgreglan soleiðis letur almenningin síggja hesar upptøkurnar verður gjørt av eini einstakari orsøk: Hetta skal virka fyribyrgjandi, soleiðis at vit kunnu sleppa undan slíkum innbrotum í framtíðini. - Hetta er ein skráplanur, sum vit vilja gera okkara til at steðga, verður sagt.

**Tey, ið hava upplýsingar í málinum, kunnu venda sær til løgregluna, tlf. 351448.**

*Kelda: Greinin er tikin av Portal.fo tann* 05.02.2014 - 11:43.

**"Big brother is watching you!"** Soleiðis skrivar George Orwell í bók síni *1984*, sum kom út í 1949.

**Uppgávuorðing:**

1. Viðmerk greinina!

2. Er tað rætt at almannakunngera slík lógarbrot. Grundgev væl fyri tíni meining!

**Ger tína egnu yvirskrift!**

## Samløga

*David Eagleman*

*Oddfríður Marni Rasmussen týddi*

Í lívinum eftir deyðan endurlivir tú allar tínar upplivingar, men hesa ferð eru hendingarnar blandaðar umaftur og í aðrari raðfylgju: allar løtur, ið hava felags dygdir, eru bólkaðar saman.

Tú brúkar tveir mánaðir til at koyra eftir gøtuni framman fyri húsini hjá tær, sjey mánaðir til sex. Tú svevur í tretivu ár og letur ikki eyguni upp. Í fimm mánaðir út í eitt blaðar tú í bløðum, meðan tú situr á vesinum. Tú tekur alla pínuna í einum, allar sjeyogtjúgu pínufullu tímarnar samstundis. Bein brotna. Bilar sorast, húð verður skorin, børn verða følld. Tá ið tú ert komin ígjøgnum hetta, er restin av lívinum eftir deyðan líðingaleyst.



Men hetta merkir ikki, at tað altíð er hugnaligt. Tú brúkar seks dagar at klippa negl. Fimtan mánaðir at leita eftir burturmistum lutum. Átjan mánaðir at standa í kø. Tvey ár í keðsemi: tú starir út gjøgnum eitt bussvindeyga, situr í einari floghavn. Í eitt ár lesur tú bøkur. Eyguni verkja, og tað skriðar, tí at tú ikki kann fara undir brúsuna fyrr enn tín tíð er komin at fara undir eitt tveyhundrað daga brúsumaraton. Tvær vikur brúkar tú til at undrast á, hvat hendir, tá ið tú doyrt. Ein minutt til at fata, at kroppurin dettur. Sjeyoghálvfjerðs tímar til hurlivasar. Ein tíma, har tú varnast, at tú hevur gloymt navnið á onkrum. Tríggjar vikur, har tú varnast, at tú ert farin skeivur. Í tveir dagur lýgur tú. Í seks vikur bíðar tú eftir grønum ljósi. Í sjey vikur spýrt tú. Í fjúrtan minuttir upplivir tú sanna gleði. Í tríggjar mánaðir vaskar tú klæði. Í fimtan tímar skrivar tú undir. Í tveir dagar bindur tú lissur. Í sjeyogtrýss dagar hevur tú hjartasorg. Í fimm dagar ert tú vilstur. Í tríggjar dagar roknar tú drykkipengar út á matstovum. Einoghálvtrýss dagar brúkar tú til at gera av, hvørji klæði tú skalt lata teg í. Í níggju dagar letur tú sum um, at tú veitst, hvat tosað verður um. Í tvær vikur telur tú pengar. Í átjan dagar starir tú inn í køliskápið. Tær leingist í fýraogtretivu dagar. Í seks mánaðir

hyggur tú eftir lýsingum. Í fýra vikur situr tú og hugsar, um tú kundi brúkt tíðina til okkurt betri. Í trý ár svølgir tú mat. Í fimm dagar dregur tú rennilás og knappar knappar. Í fimm minuttir hugsar tú um, hvussu lívið hevði verið, um tú blandaði løturnar umaftur í aðrari raðfylgju. Í hesum partinum av lívinum eftir deyðan, ímyndar tú tær okkurt samsvarandi við jarðarlívið, og ímyndin er eydnusæl: eitt lív, har hendingar eru býttar sundur í smá petti, ið kunnu svølgjast, har løtur ikki eru varandi, har ein upplivir gleði við at leypa frá einari hending til aðra sum eitt barn, ið loypur av staði á stað á tí brennandi sandinum.



*Søgan er úr Vencli nummar 12.*

**Uppgávuurorðing:**

1. Greina og tulka søguna.
2. Hvat brúka vit tíðina til?
3. Hvussu fáa vit sum mest burtur úr lívinum?

**Stílurin skal eita: Soleiðis brúki eg lív mítt**

**HVAT BRÚKAR TÚ TÍÐINA TIL!**